## Lata kirkjur aftur



*82 prosent av dønum eru í fólkakirkjuni, men fá ganga í kirkju*

*(Mynd: DR)*

Í Keypmannahavn hevur kirkjuleiðslan skotið upp at lata fleiri kirkjur aftur, tí so fá fólk ganga í kirkju. Sambært kringvarpinum DR mælir leiðslan til at lata 10 kirkjur aftur. Talan er um kirkjur, sum vórðu bygdar fyri umleið 100 árum síðani. Summastaðni eru kirkjuráðini ímóti at lata kirkjurnar aftur, men sambært kringvarpinum bendir alt á, at Birthe Rønn Hornbech, kirkjumálaráðharri, fer at fylgja tilmælinum um at lata tær 10 kirkjurnar aftur.

## Eik vil yvirtaka kundar

Internetbankin Eik Bank (fyrrverandi Scandia Bank) bjóðar sær nú at yvirtaka kundarnar hjá Northern Rock, sum fyrr í vikuni mátti snara lyklinum um í Danmark. Internetbankin Eik Bank ger sær dælt av, at Northern Rock nú ikki longur er á danska marknaðinum og smíðar meðan jarnið er heitt. Sambært TV2 Nyhederne bjóðar Eik Bank, at kundarnir hjá Northern Bank kunnu fáa somu rentu sum higartil, um teir flyta sínar innlánskonti til Eik Bank innan tríggjar vikur.

# Eiga at lurta eftir náttúru-felagsskapum



**Hjalti í Jákupsstovu, fiskifrøðingur, sigur, at nú eyguni eru vend móti toskinum, eiga vit at lurta eftir tí, sum sagt verður. - Í dag hava vit eitt fyrimyndarligt grindadráp, men tað høvdu vit ikki, fyrr enn umheimurin fór at vísa hesum áhuga, sigur hann**

TOSKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sambært útlendskum fjølmiðlum, hava fleiri kommunur í Svøríki gjørt av ikki at keypa tosk til sínar matskráir í skúlum, stovnum og aðrastaðni, har heitur matur verður latin. Men tað eru ikki bara kommunur, sum hava tikið hetta stig. Ein spurnarkanning, sum TV4 hevur gjørt, vísir, at 37% av svium vilja ikki keypa tosk, og tað eru eisini matstovur, sum ikki keypa tosk meira, tí starvsfólkini tíma ikki at taka spurningin upp við viðskiftafólk, um toskur er hóttur ella ikki.

Ein av náttúruverndarfelagsskapunum, sum beinleiðis hevur mælt frá at keypa tosk, er heimsnáttúrugrunnurin, WWF. Toskurin er illa fyri í Eystursjónum og Kattegat, og tí hevur eitt svenskt blað enntá samanborið keyp av toski við keyp av fílabeinum úr Afriku.



*- Tiltøkini hjá náttúrufelagsskapum eiga at minna okkum á, at tilfeingið í havinum er ikki óavmarkað, sigur Hjalti í Jákupsstovu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### At lurta

Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni, ásannar, at ávísir náttúrufelagsskapir stundum kunnu vera rættiliga ógvusligir í sínum útmeldingum.

- Men vit eiga sjálvsagt at lurta eftir, hvat tað er, sum teir vilja siga okkum – antin vit eru samd ella ei.

Hann vísir á, at hóast føroyska toskaveiðan eftir hansara tykki hevur verið alt ov hørð seinastu árini, samstundis sum veiðinøgdin er minkað, stendur kanska uppppaftur verri til í Eystursjónum og Kattegat.

- Avgerðin hjá alt fleiri



*Við sær til Føroya hevur Ernst Sondum Dalsgarð Merete Sveistrup, Pia Schnack og kenda danska klaverleikaran Vagn Sørensen*

# Sangur í serfl

**Í næstum kemur kendi føroyski sangarin Ernst Sondum Dalsgarð til Føroya at framføra á konsertum kring landið, og á konsertini í Klaksvík luttekur kórið Suð**

KONSERTIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Við sær á konsertferðini í Føroyum hevur Ernst songkvinnurnar Merete Sveistrup og Pia Schnack. Tey fara at borðreiða við alskyns perlum úr operum og sangleikum. Við til Føroya kemur eisini kendi klaverleikarin Vagn Sørensen, sum eitt nú fer at framføra eitt soloverk fyri klaver, ið hevur sín uppruna í operaheiminum.

Ernst Sondum Dalsgarð er kendur av flestu tónleikaranjótarum her á landi, og hann er rættiliga við at fáa fótin fyri seg sum solistur á Kongaligu Operuni í Keypmannahavn, har hann er í starvi sum sangari. Eisini á øðrum kendum pall-